## VALGREINAR

# Almenna fyrisitingin má minka

**Meinhardt Hansen**
*valevni Sambandsflokksins í Norðoyggjum*



Fyri góðum 2 árum síðan vaknaði løgmaður við kaldan dreym og staðfesti at vit brúktu eina milliard meira um árið, uttan at nakar visti um vit fingu nakað fyri peningin. Nú var stundin komin, har vit sleptu forkromaðum donskum skipanum og funnu loysnir, ið hóskaðu til føroyska samfelagið.

Síðan tørnaði hann eftir øllum at døma innaftur, tí almenni vøksturin hevur bara staðið við og versnað, einki sæst til "serføroysku" loysnirnar, men er forkromingin hinvegin farin at skalla av, so man sær beint inn á sminkaða fullveldislíkið.

Einasta privatisering, ið er framd seinastu 6 árini er kunningardiskurin á flogvøllinum, heili 1 (eitt!!!) arbeiðispláss, men bløðini eru framvegis á tremur við lýsingum eftir fólki til tað almenna, samstundis sum hópuppsagnir eru t.d. umborð á rækjuskipum og innan alivinnuna.

Hetta má fáa ein enda, og tað gerst ikki við at flyta almennar funktiónir innan eitt nú heilsuøkið frá útjaðaranum og til Havnar. Hinvegin kann tað t.d. gerast við at innføra setanarsteðg í miðfyrisitingini.

Sambandsflokkurin hevur havt ítøkilig uppskot um at effektivisera umsitingina við at minka um talið av almennum ráðum. Higartil hevur tíverri ikki verið undirtøka fyri hesum, tí yvirtøku- og loysingarflokkarnir halda tað vera stuttligari at pussa krom.

Vil tú vera við til at broyta skeivu gongdina í býtinum millum almenna fyrisiting og privata vinnu, vel so Sambandsflokkin.

# Bíblian og politikkur

**Reimund Langgaard**
*valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Eg eri av tí áskoðan, at Bíblian skal vera okkara hægsti myndugleiki. Sum t.d. eri eg ímóti manndrápi - bæði av menniskjum í og uttan fyri móðurlív. Eisini eri eg ímóti skrásettum parlag, og ynski eg at arbeiða fyri minkandi misnýtslu av rúsevnum.

Flestu av teimum avgerðum, sum verða tiknar í Føroya Løgtingi, eru tó innan eina "gráa zonu", sum Bíblian, av góðum grundum, ikki gevur eitt eintýðugt svar uppá. T.d. í fiskivinnu-, oljuvinnu-, loysingar- og fíggjarmálum. Her meini eg, at vit eiga at brúka okkara Gudgivna vit og skil, til at taka skilabestu avgerðirnar.

Sambandsflokkurin byggir sín politikk á kristna grund, samstundis sum eg meti hann hava skilabesta svarið uppá stýringina av teimum "gráu zonunum".

# Vágatunnilin og bummgjaldið, her má broyting koma í

**Jónfinn Olsen**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Lat meg fyrst siga, at tað er sera gott at vágatunnilin er vorðin veruleiki, til bata fyri samfelagið alt, í staðin fyri tað gamla sambandið sum var.

Tá tað er sagt, so meini eg tað, tá eitt alment P/F hevur kalkulera við 400 akførum um samdøgrið, og veruleikin vísir seg síðan at vera góð 800 akfør (meir enn tað tvífalda), so kundi man hugsa sær at prísurin bleiv ávirkaður av hesi orsøk. Men nei, tað, metir vágatunnilin ikki, er neyðugt fyrr enn væl inn í ár 2004.

Her skuldi verið tala at, so at hetta bleiv endurskoða fyrst og fremst framleiðandi vinnuni at frama, og síðan øllum teimum sum nýta tunnilin.

Til dømis pendlararnir sum koyra nærum hvønn dag, skuldu fingið eina serliga bonusskipan, sum kundi verið at koyrdi ein meira enn 25 dagar um mánaðin, skuldi túra kostnaðurin verið minkaður fyri viðkomandi, sum hevur so nógvar túrar mánaðarliga við einum avsláttarstigi uppá -50%.

Framleiðandi vinnan skuldi fingið eina líknandi skipan, ella koyrt heilt ókeypis.

Tað skuldi ikki verið so ringt at funni út av hjá P/F Vágatunnlinum, tí teir hava sjálvir kalkulerað við 400 akførum sum nóg mikið, fyri at tunnilin skuldi bera seg. Nú tá tað so vísur seg at tunnilin verður nýttur av tvífalt so mongum akførum (gott og væl tað), skuldi eitt avlop víst seg so ella so. Hetta átti so at komi fyrst og fremst framleiðandi vinnuni til góðar, og eisini teimum sum nýta tunnilin so at siga hvønn dag.

Innan handilsvinnuna plagar man at siga at hægri "umsetningshastigheitin" er á eini vøru, jú fleiri keyparar hevur tú til tað umtalaðu vøruna (sjálvsagt), og hetta skildast ofta at prísurin er lækkaður á viðkomandi vøru, tí veksur "umsetningshæstigheitin" á vøruni (meira verður keypt av hesi vøru). Tú kanst rokna við at fleiri kundar fara at keypa eina vøru, sum lækkar í prísi, og hetta kann enda við ("sum tað ger í flestu førum") at samlaði vinningurin hjá fyritøkuni er veksandi í hesum sambandi.

Hetta skuldi eisini verið galdandi fyri P/F Vágatunnilin, lægri prís jú fleiri akfør (hægri "umsetningshastigheit") = meiri nýtslu av Vágatunnilinum.

So er bara eftir at spyrja, hví er ongin broyting framd hjá P/F Vágatunnlinum, tá tølini eru púra "klokkuklár", yvir hvussu nógv akfør nýta tunnilin um samdøgrið.

MIÐFLOKKURIN er ein flokkur sum roynir at hugsa um vinnuna og borgaran. So nú hevur tú møguleikan at hugsa um MIÐFLOKKIN á valdegnum 20 jan. 2004. Ja enntá velja MIÐFLOKKIN (ELLA GREINASKRIVARAN) so hann fær eina ávirkan á samfelagið alt.

Eisini tunnilsgjaldið í goldið verður fyri at ferðast gjøgnum Vágatunnilin.

# Tíð til at einskilja!

**Dánial Petur Hansen**
*Valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



Ein av avleiðingunum av tí stóru búskaparkreppuni í nítiárunum varð, at tað almenna gjøgnum grunnar yvirtók stóran part av tí privata virkseminum, ið ikki megnaði at hóra undan. Nevnast kann Føroya Banki, Føroya Fiskavirking, Faroe Seafood og JFK-trol. Talan er her um fyritøkur, ið breið semja er um eiga at verða riknar av tí privata og stýrdar av teimum fríu marknaðarkreftunum og ikki tí almenna. Tað almenna, tað vil siga landið vegna okkum øll somul, átekur sær ein stóran váða og hevur stór kapitalvirði bundin í hesum fyritøkum. Einskilјing av hesum fyritøkum, saman við fyritøkum sum Føroya Tele, Atlantsflog, v.fl. vildi frígivið hesi kapitalvirði.

Kapitalurin sum fæst til vega frá einskiljingum eigur at vera nýttur til at niðurgjalda uttanlandsskuld okkara, og harvið minka munandi um rentuútreiðslur landskassans.

**Greiður skilnaður millum alment og privat**

Rættast er at taka avgerð um hvar kapitalurin sum fæst til vega frá einskiljingum verður placeraður, áðrenn byrjað verður at einskilja, soleiðis at møguligar einskiljingar ikki økja rakstrarútreiðslurnar hjá tí almenna, ella á annan hátt órógva føroyska búskapin skeiva vegin.

Ein greiður skilnaður eigur at verða millum alment og privat, og nú tann føroyski Virðisbrævamarknaðurin er settur á stovn, eiga vit at byrja uppá at einskilja tær vinnuligu fyritøkurnar hjá landinum.

Neyðugt er at fara fram við skynsemi, og vil ein vælvirkandi føroyskur virðisbrævamarknaður verða við til at tryggja neyðuga gjøgnumskygnið, og at vit øll somul fáa nóg mikið fyri tær vinnuligu fyritøkurnar hjá landinum.

Ein nýggj og virkin byrjan við Sjálvstýrisflokkinum er tann gongda leiðin. Gott val!

# Jóannes vil hava sambandsstýri

**Jógvan Arge**
*Valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Nýggjasta veljarakanningin vísir, at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin fáa 18 tinglimir og meirilutan einsamallir eftir valið.

Jóannes Eidesgaard er ovurfegin og syngur í kór saman við Lisbeth L. Petersen, at tað ruddiligasta er, at tveir flokkar mynda landsstýrið eftir valið.

Tað merkir, at Javnaðarflokkurin ímóti sínum lyftum um økt sjálvstýri og sjálvberandi búskap ætlar at tryggja Lisbeth L. Petersen løgmanssessin og á tann hátt steðga allari sjálvstýristilgongdini.

Øll minnast, hvussu Edmund Joensen í samgonguni frá 1994 til 1998 hótti við nývali, hvørja ferð Javnaðarflokkurin vildi kanna ríkisrættarligu viðurskiftini. Sambandsflokkurin vildi onki tá, og hann vil enn minni nú.

Javnaðarflokkurin tykist vilja enda í somu konservativu tvinguni, sum hann sat í, tá Edmund Joensen ráddi fyri borgum. Tosið hjá Javnaðarflokkinum um sjálvstýri hevur tí onki innihald.

Tjóðveldisflokkurin leggur allar árar í sjógv at forða fyri, at Føroyar fáa eitt viljaleyst sambandsstýri eftir valið. Vel tí Tjóðveldisflokkin.

---



## VALGREINAR

# Skattareformurin hjá Sambandsflokkinum

**Lisbeth L. Petersen**
*løgtingskvinna og valevni Sambandsfloksins*



Nógvar gitingar eru um skattaskipanina, sum Sambandsflokkurin hevur í síni valskrá, og tí skal enn einaferð vísast á, hví Sambandsflokkurin vil hava verandi skipan broytta.

**Tí vil Sambandsflokkurin hava ein skattareform:**
Skattastrýstið í Føroyum er vorðið so høgt, at tað køvir hugin at arbeiða. Vit gjalda snøgt sagt heimsins hægsta skatt, vísir ein nýggj kanning.

Verandi skattaskipan er órættvís, tí at allar inntøkur omanfyri 14.000 krónur um mánaðin verða skattaðar við hægsta skattastigi.

Lønarvøksturin, sum tey lægstløntu hava vunnið sær seinru árini, er uppetin av at vera skattaðar við hægsta skattastigi.

Av hvørji vunnari krónu eyka eru heili 60 oyru farin beinleiðis aftur í skatti.

Hóast skattalættar á 3-400 milliónir er meðal landsskattaprosentið hjá vanliga føroyinginum økt við 3 prosentum seinastu seks árini..

**Hvat skal skattareformurin broyta:**
Sambandsflokkurin vil hava eina gjøgnumskygda og rættvísa skattaskipan, sum bæði fer at lætta um hjá tí einstaka og fer at stimbra føroyska vinnulívið.

Tað skal loysa seg betur at arbeiða og at gera ein eyka innsats, sum bæði kemur vinnulívinum, tí einstaka og í síðsta enda okkum øllum til góðar.

Við skattareforminum tryggja vit grundarlagið undir framburði og vøkstri í føroyska búskapinum við eini meira proportionalari skattaskipan.

**Langsiktaða málið er at:**
- Skatturin av eyka arbeiði verður 40% í staðin fyri núverandi 60%
- Verandi fjaldu/innbygdu skattahækkingar verða burturbeindar
- Tað skal vera lætt at rokna skattin út
- Skattaskipanin skal vera løtt at umsita

Málini røkka vit í stigum.

**Hvussu verður skattareformurin framdur:**
Tey fyrstu fýra árini er ætlanin at botnfrádrátturin í landsskattinum stigvíst fer úr 22.000 krónum upp í 30.000 krónur, samstundis sum markið fyri, nær inntøkan verður toppskattað, fer úr verandi 14.000 krónum um mánaðin til 25.000 krónur um mánaðin..

Skattareformurin tryggjar, at øll fáa skattalætta.

Við skattareforminum verður mett, at landsskattainntøkurnar frá persónsskatti fara at minka við 60 milliónum árliga næstu fýra árini.

Soleiðis verður afturvíst, at skattareformurin hjá Sambandsflokkinum er ein skipan, har bert tær høgu inntøkurnar fáa skattalætta, meðan tær lágu lønirnar skulu gjalda prísin. Tvørturímóti er skipanin ein meira rættvís skipan, ið er tiltrongd og vil tæna teim endamálum, sum Sambandsflokkurin hevur sett sær fyri at virka fyri í komandi valskeiði, so Føroyar verða eitt gott samfelag, har øll skulu trívast.

# Bústaðarviðurskifti til tey sum bera brek

**Helena Dam á Neystabø**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



At tryggja teimum sum bera brek góð bústaðarviðurskifti er eitt mál, sum fram um onnur mál trokar á.

Álit eftir álit er skrivað, men enn er langt á mál. Eg veit at flest øll sum eru rakt av hesum trupulleika fegin vilja taka á seg ábyrgd, og vera við í teimum loysnum, sum tað almenna kann bjóða.

Hesum møguleika og hesari útrættu hondini eigur politiski myndugleikin at taka av, og so skjótt sum møguligt leggja eina ætlan, sum røkkur inn í framtíðina.

Vónandi verður tað ikki neyðugt at viðgera henda spurning í næsta valdysti um fýra ár.

# Bergholið til Dals

**Birgir Mohr**
*Valevni Javnaðarfloksins í Sandoynni*



Nakað undan seinasta løgtingsvali – ella seinast í 2001 løgdu tveir flokkar uppskot inn á Løgting at játta kr. 1/2 millión til forkanningar av bergholi til Dals.

Somu flokkar – t.v.s. Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin komu í landsstýrið eftir valið. Tær 500.000,- kr. vóru játtaðar, og Fólkaflokkurin átti landsstýrismannin á hesum økinum, sum kundi seta arbeiði í gongd.

Tað øll høvdu væntað – at nú fór hendan forkanning í gongd, vit høvdu góðar tíðir enn tá – tað hendi als iki. Einki varð gjørt og játtanin, sum allir flokkar atkvøddu fyri, hon fall burtur aftur, tá árið 2002 var ligið.

Hetta er tað, sum kallað verður valflesk! Hvørki Fólkaflokkurin ella Tjóðveldisflokkurin meinti nakað sum helst við hatta málið, teir bara dyrgdu eftir atkvøðum. Aftaná bleiv málið gloymt.

Fyri at endurreisa málið legði Javnaðarflokkurin í 2003 fram aftur um at játta somu upphædd 1/2 millión kr. til sama endamál. Máið varð felt – bæði Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin atkvøddu ímóti, sama gjørdu hinir báðir smáu flokkarnir.

Soleiðis royndust álitismenn og álitisflokkar í hasum málinum. Men Javnaðarflokkurin vil verja málið.

**Bátahavnin í Skúvoy**
Eisini hevur Fólkaflokkurin umsitið havnir og lendingar. Teir gjøgnumtrumfaðu ein bátahyl í Skúvoy á einum sera ivasomum fyrireikingarstøði. Vit vóru fleiri, sum vóru í iva eftir at hava sæð filmupptøkuna um brimið júst har á staðnum.

Úrslitið var ikki gott. Og viljin til at bøta harum nú aftaná, hevur verið upp aftur minni, eisini her umsat Fólkaflokkurin í lands-stýrinum?

Javnaðarflokkurin vil taka málið upp í eini komandi samgongu og finna eina loysn, sum eisini umfatar betri atløgumøguleika fyri Sildberan, sum eisini treingir til at vera útskiftur við meira tíðarhóskandi skip.

Veljið Javnaðarlfokkin.

# Vágatunnilin – øll gjøld eiga niður við 50 %….

**Jóanis Nielsen**
*valevni Fólkaflokkurin í Vágum*
*www.joanisnielsen.fo*



P/f Vágatunnilin hevur tað fyrsta árið havt eina inntøku uppá kr. 25,4 mill., ætlaði raksturin varð settur til kr. 18,5 mill. - sostatt ein meirinntøka uppá kr. 5,9 mill. t.v.s. at inntøkurnar eru ca. 32% størri enn útreiðslurnar.

Sostatt kann gjaldið setast niður við 32 %, og P/f Vágatunnilin kann svara hvørjum sítt, uttan at rokna við at ferðslan økist við at minka prísin við 32%, men øll fornuft sigur, at um gjaldið verður sett niður, so verður sjálvandi meir ferðsla.

**Gjøldini niður í helvt.**
Mínar útrokningar siga, at gjaldið kann minka við 50% - ferðslan kemur tá at økjast so mikið nógv, at P/f Vágatunnilin sjálvt tá kann svara hvørjum sítt.

Øll minnast vit skiparan á Ternuni.

Øll minnast vit, tá ið nevndin tvíhelt um at 280 bilar vórðu førdir um Sundið pr dag.

Vágafólk eru Karmali Olsen - skipara á Ternuni - sera takksom fyri, at hann rópti varskó og vísti á, at ferðslan var munandi meir.

**Vágafólk umboð í P/f Vágatunnilin.**
Landsstýrismaðurin hevði ætlanir um at vágafólk skuldu fáa umboðan í partafelagnum. Uppgávan, hjá komandi umboðum fyri Vágar í P/f Vágatunnlinum, verður at sannføra hinar nevndarlimirnar um, at tá ið prísurin fer niður - tá økist ferðslan.

X við Fólkaflokkin

Borgan fyri framhaldandi menning í VÁGUM.

# Hví skal Palleba altíð renna frá Peri til Pól?

**Heðin Mortensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



Ein støðug forðing, vanligi borgarin í Føroyum ferð eftir ferð rennir seg í, er tann fløkta og ofta illa samskipaða almenna fyrisitingin.

Hevur tú ein trupulleika, verður hann sjáldan minni av, at tú skalt renna frá Peri til Pól, kanska enntá uttan at fáa greið boð ella at fáa tínar spurningar svaraðar á einum og sama stað.

Eg havi gjørt vart við tað fyrr, og eg kann bara endurtaka, at okkum tørvar eina vælvirkandi og sterka almenna fyrisiting, ið fyrst og fremst hevur til endamáls at veita øllum borgarum skjóta og effektiva tænastu.

Tey, ið veruliga hava brúk fyri almennum tænastum, orka ikki og eiga ikki at skula renna sum fluga í fløsku, tí nú eru tey aftur komin á »skeivt stað« at leita sær hjálp.

Hóast almennu útreiðslurnar eru øktar øgiligt seinnu árini, tykist effektiviteturin ikki at hava fylgt við. Kunnu umskipingar av almennum tænastum betra um hesi viðurskifti, er hetta einki at bíða við.

Sambandsflokkurin vil gera nakað við málið, so Palleba altíð skal vita, hvussu hann best kann fáa ta hjálp og tænastu, føroyska samfelagið til eina og hvørja tíð eigur at geva sínum borgarum. Ikki fyrr enn tá kunnu vit tosa um sanna vælferð!